# Tóku fyrsta stigið í 1990, fáa vit fyrsta stigið í 2007?

Innan tvær vikur hava vit havt tveir "franskar" visittir. Fyrst var tað William Jefferson "Bill" Clinton, ið kom til lands. Kom oman á Vaglið, stuðlaði handilsvinnuni í Miðbýnum, og segði so nøkur góð og væl vald orð í Norðurlandahúsinum. Og sigast má, at Bill legði okkum "Flag" á. Flestu okkara hava valt, ikki at hava flagtak fyri at sleppa undan øllum kyktum, ið koma í kjalarvørrinum av einum flagtaki. Men flagtøkini var tað fyrsta og besta, sum tann gløggi Clinton tók til sín á stuttu Føroya-ferðini. So nú sita vit øll, uttan kanska bara Óli B. og vóna, at Hillary vinnur forsetavalið komandi ár. Tí so verður flagtak lagt oman yvir Hvítu Húsini. Men um flagtakið fer at røkka, sum rakett-skjøldur hjá Hvítu Húsunum man verða meira ivasamt. Men Bill Clinton fæst óiva at skriva undir uppá, at flagtøk verður ein góð útflutningsvøra hjá Føroyum. Clinton hevur so skrivað undir, og skrivað uppá alt møguligt annað, her á stuttu Føroya-vitjanini. Í hesum døgum hava vit fingið ein annan franskan visitt, nevnliga franska fótbóltslandsliðið.





Hesir eru kortini so frægir, at teir liggja nátt í Føroyum. Hartil hevur Atlantic Airways ikki verið undir tr‡sti at taka fleiri setur úr flogfarinum. Og so kostar tað ikki 5.000 kr. at síggja hesar bóltsnillingarnar, men "bara" 300 kr. Thierry Henry er við. Uttan at siga nakað ónt um Henry kunnu vit róligt staðfesta, at hann rennur minst líka skjótt sum Marion Jones! Henry hevur kanska skift felag, men hann hevur so ikki skift gear. Líka síðani vit tóku fyrsta stigið út í tað stóru fótbóltsverðina í 1990, hevur knípt við at koma upp í gear! Og ikki so sjáldan hava vit spolað í brekkuni, og hava fingið nakrar ordans yvirhálingar. Men altíð hava vit kunna givið landsliðs-bilinum ein góðan brekkustart, og so hava vit herja á brekkkuna aftur.

Og tíðum eru vit komin á, og tað eru tær løturnar – tíbetur – sum standa fastast í minninum! Meðan Henry jaktar metið hjá UEFA-forsetanum Michel Platini, sum eisini hevur verið ein franskan visitt í Føroyum, so jaktar Rógvi Jacobsen mál nr. 10. Rógvi torir ikki at lova okkum, um tað kemur hesuferð, um eitt ár, tvey ár, ella nakrantíð. Men tá tað einaferð kemur – vónandi skjótt – er hann mest skorandi føroyingur í heimssøguni, við 10 málum. Men tað er kalt í botninum! Vit hava tr‡ mál frá Rógva í hesari kappingini, men enn er kalt; 0 stig. Vit hava tríggjar dystir eftir, ímóti trimum av teimum 8 liðunum, ið vóru í HM-fjórðingsfinaluni. Og kortini spyrja vit: "Fáa vit fyrsta stigið í 2007". Ella mugu vit liva við einari null-loysn? Tá er kanska betur við einari franskari visitt frá Bill Clinton. Bill er frá Littlerock, so kanska hann viðger føroyska grótið næstu ferð? Tí tá vinna vit øll, Bill fær so eisini sítt. Kanska Demokratia fær lokkað Hillary til Føroya í næstum, hvør veit?

## Leyst og fast um stórt og smátt

Sigast má, at SEV-stýrið hevur verið eitt fyri-BYRGINGAR-ráð.

Nú fer Klæmint at brúka sína VATNorku uppá okkurt annað.

Nú nýtast aðrir streymveitarar ikki at hava WEIHE-loyvi!

Ivasamt er hvussu nógv vatnorka fæst úr Stórutjørn?

Clinton skrivaði á fleiri setur, mundi hann fáa tíð at skriva á Fróðskaparsetrið.

Flogfarið hjá Atlantic er farin til reinsingar tí Clinton hevur skrivað á øll setrini!

Næstu ferð Clinton kemur til Føroya, fer hann at skipa fyri einum SETURsskúla.




## Pávin á vøllin

Kanska verður pávin Benedict XVI tann næsti, sum fer at lata seg í einar gular gaggur og fer at renna á vøllin á Olympiska leikvøllinum í Rom. Í øllum førum hevur hann fingið eina nýggja fótbóltstroyggju, sum Giovanni Langella úr Ancona lat honum nú um dagarnar. Á rygginum hevur pávin fingið nummar 16. Troyggin var latin pávanum í sambandi við ein vælgerandi fótbóltsdyst. Kanska hevði tað verið líka gott, um pávin – um hann nú ætlar sær á vøllin – kemur í onkrum av teimum hátíðarligu klæðunum, sum hann annars plagar at ganga í.

## Oscar í pakkhúsinum

Oscar-heiðurslønin er nakað av tí størsta, sum fólk innan filmsídnaðin kunnu uppliva, men Oscar-standmyndin – sjálv ímyndin av stór showinum – er ikki altíð at finna á tí reyða løparanum. Á myndini sæst listakvinnan Dena D'Angelo í holt við at mála stóra Oscar-standmyndir til komandi Oscar showið, sum veðrur hildið fyrst í komandi ár. Arbeiðið hjá D'Angelo fer fram í einum pakkhúsi í Sagus í California – so hesir Oscar'nir eru ikki blivnir við forkelaðir við glitri og gleimi enn.

